**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 4109
**Navn:** P/F Sandskip
Adressa: 530 Fuglafjørður
Kommuna: Fuglafjarðar
Stovningardato: 19-12-2005
Viðtøkudato: 19-12-2005
**Stovnarar:**
Gordon Martin Peturson Midjord, Bøvegur 24, 530 Fuglafjørður
Petur Jacob Andreas Frædd Midjord, 530 Fuglafjørður
**Nevnd:**
Ása Sigurðsdóttir Midjord, Norður í gerðið 7, 530 Fuglafjørður, (nevndarformaður)
Gordon Martin Peturson Midjord, Bøvegur 24, 530 Fuglafjørður, (nevndarlimur)
Petur Jacob Andreas Frædd Midjord, 530 Fuglafjørður, (nevndarlimur)
**Stjórn:**
Gordon Martin Peturson Midjord, Bøvegur 24, 530 Fuglafjørður, (stjóri)
**Grannskoðari:**
P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 110 Tórshavn
Partapeningur: kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra ella tveimum nevndarlimum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga partapening, skiparakstur, handil og annað starv í hesum sambandi.
Roknskaparár: 01.01 - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 19.12.2005 - 31.12.2006

Skráseting Føroya tann 29. desember 2005

Kristin Balle

# Pedagogar

Dr. Margrethu Barnagarður er normeraður til 94 børn í aldrinum 0 til 7 ár.

**Vit søkja eftir 4 pedagogum at starvast millum 20 og 34 tímar um vikuna. Øll størvini eru á barnagarðsstovu, at byrja 1. februar 2006 (ella eftir nærri avtalu).**
**Næmingar, sum fáa pedagogprógv í februar eru vælkomnir at søkja.**

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er, at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Ein stovn í menning, hvar tú fært møguleikan at seta tín dám á dagligdagin
- Ein vælvirkandi starvsfólkabólk
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi
- 94 praktfull børn

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevnir
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur ábyrgdarkenslu

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønarstig 10/16.

Meira fæst at vita við, at venda sær til leiðaran Marjun Lassen ella varaleiðaran Súsannu Ziska á tlf. 455557.

Skrivlig umsókn við prógvi skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. januar 2006 kl. 12.00.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
FO-700 Klaksvík

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Tekniskur stjóri til Tórshavnar kommunu



Tekniski stjórin fer at starvast í ráðhúsinum har m.a. borgarstjórin, kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin húsast.

**Tekniska deild**
Tekniska deild hevur 12 fólk í arbeiði og heldur til í gamla poshúsbygninginum saman við byggi- og býarskipanardeildini.

Arbeiðsøkið hjá teknisku fyrisitingini er m.a. at viðgera byggimál og umsóknir um útstykkingar, planleggja og projektera umfram at halda við líka kommunala vegakervið og tekniskar veitingar, sum kommunan hevur ábyrgd av.

**Byggi- og býarskipanardeildin**
Á deildini starvast 12 fólk, harav 3 burturav við málsviðgerð av umsóknum um byggiloyvi v.m.

**Kommunala Brennistøðin**
tekur ímóti dagrenovatión og ídnaðarruski og øðrum burturkasti til endurnýtslu, brenning og tyrving.

- leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

Tórshavnar kommunu søkir eftir tekniskum stjóra. Tekniski stjórin er ovasti leiðari fyri teknisku fyrisitingini við tilvísing til kommunustjóra og borgarstjóran.

Tekniski stjórin verður limur í leiðslubólkinum hjá kommununi. Í honum eru herumframt borgarstjórin, kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin. Tekniski stjórin verður við til at raðfesta uppgávurnar og leggja framtíðar ætlanir hjá kommununi saman við politisku skipanini.

**Arbeiðsuppgávur:**
Høvuðsuppgávan verður at stjórna og samskipa tey øki, ið hoyra til teknisku umsitingina, og hava ábyrgdina av fakligu, umsitingarligu og fíggjarligu stýringini innan hesi øki.

Tekniski stjórin skal samskipa og raðfesta uppgávurnar á økinum og tryggja, at mest møgulig nytta fæst úr tilfeingi kommununnar. Hetta við t.d. at menna fyrisitingina í samsvari við útbúgvingarpolitikkin, sum verður orðaður. Tekniski stjórin skal eisini tryggja, at fyrisitingin hevur eitt gott samskifti við borgaran, viðskiftafólk og landsstovnar.

Næstu starvsfólkini hjá tekniska stjóranum vera býarverkfrøðingurin og býararkitekturin, sum er byggifulltrúi.

Tekniski stjórin er bindilið millum teknisku umsitingina og politisku skipanina og skal ansa eftir, at lógir, reglugerðir og samtyktir verða fylgdar.

**Tórshavnar kommuna roknar við, at umsøkjari**
- Er áhugaður í og hevur møguliga vitan um býarskipanarlig viðurskifti, býarvarðveiting, náttúru- og umhvørvismál og tekniska økið.
- Hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni.
- Gongur á odda, er sjónligur og motiverandi.
- Dugir væl at fyrisita og samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.
- Hevur leiðsluroyndir, er málsøkjandi og tekur undir við einum nýmótans leiðslustíli.
- Er jaligur og til reiðar at taka avgerðir.
- Hevur virðing, fatan fyri og vil samstarva við ta politisku skipanina.
- Dugir at málbera seg á føroyskum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv lønt í 38. lønarflokki (treytað av góðkenning fíggjarmálaráðharrans) við tvey ára royndartíð.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 5. januar 2006 kl. 16.00. Viðmerkið umsóknina "Tekniski stjóri".

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Saltspreiðarar og saltkassar





Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Frá Stráluni

Vit ynskja øllum eitt gott nýggjár

Vit vilja takka øllum tykkum, ið hava hjálpt og stuðlað okkum í ár

Bestu heilsanir

STRÁLAN

Vit ynskja øllum viðskiftafólki okkara eitt gott og eydnuberandi nýggjár, við tøkk fyri góðan stuðul í 2005

WISEMAG.FØROYAR
www.wisemag.fo